# Nýggjur tingmaður ovfarin av úrslitinum

**–Vit royndu at fáa fólk um at brúka høvdið meiri enn hjartað og tað gav úrslit, sigur Johan Dahl, nyvaldur tingmaður fyri sambandsflokkin**

LØGTINGSVALIÐ
*Áki Bertholdsen*

– Eg fari at brúka tingsessin til at arbeiða fyri Suðuroynni – og til at arbeiða fyri Føroyum sum heild.

Nývaldi tingmaðurin hjá sambandsflokkinum í Suðuroynni, Johan Dahl, er ómetaliga væl nøgdur við valið.

Hann hevur ikki sitið á tingið fyrr, men við 300 persónligum atkvøðum, var tingsessiurin hesuferð bæði tryggur og sannførandi. Sostatt fekk Johan Dahl væl meiri enn tvær ferðir so nógvar atkvøður sum næsti maður á listanum, sum var Finnleif Guttesen, borgarstjóri á Tvøroyri, sum fekk 114 atkvøður.

At Johan Dahl bleiv nýggja stjørnuskotið hjá sambandinum í Suðuroy, fekst ein ábending um longu á fólkatingsvalinum, tí hóast tað var fyrstu ferð, hann stillaði upp yvirhøvur, fekk hann yvir hálvtannaðhundrað atkvøður.

– Sjálvsagt hevði eg vónað at vit fingu eitt gott væl, men at eg skuldi fáa 300 atkvøður, hevði eg ikki droymt um, sigur hann.

Sjálvur hevði hann væntað, at sambandsflokkurin fekk eitt gott val, men hann sigur, at tað góða úrslitið er sanniliga ikki komið av sær sjálvum.

– Vit hava arbeitt hart uppundir valið. Vit hava tosað nógv við fólk, vit hava skrivað nógv og vit hava rikið dúgliga. Vit hava roynt at føra okkara mál fram og fyrst og fremst hava vit heitt á fólk um at brúka høvdu ístaðin fyri at lata seg stýra av hjartanum. Sjálvsagt skal hjarta vera við, men politikkur er ikki bara ein spurningur um kenslur, tað er eisini ein spurningur um vit og skil og tað hevur veljarin tikið at sær.



*– Ein samgonga við sambandsflokkinum, fer ikki at raðfesta Suðuroynna aftari enn samgongan í farna valskeiði, hevur gjørt, sigur Johan Dahl, nývaldur tingmaður fyri Suðuroynna.*

### Menna Suðuroynna

Vit spurdu síðani Johan Dahl, hvat hann ætlar at brúka núvunna tingsessin til.

– Eg vóni sanniliga, at vit koma í samgongu, so at vit fáa ávirkan og har fari eg at brúka tingsessin til at arbeiða á ein hátt, sum gagnar samnfelagnum best møguligt. Men eg fari eisini at brúka tingsessin til at arbeiða fyri Suðuroynni.

Johan Dahl sigur, at í Suðuroynni er tað nøkur mál, sum tað hevur stóran týdning at fáa upp á pláss.

– Fyrst og fremst er tað tunnilin ímillum Øravík og Hov, sum vit mugu arbeiða fyri.

Annars hevur Johan Dahl róð framundir, at politikarar í Suðuroy skulu seta seg saman at gera eina suðuroyarætlan, har teir stinga út í kortið, hvussu teir vilja hava oynna at síggja út um 20-30 ár, heilt úre Sandvík, suður til Sumbiar.

– Nú valið er av, stendur hann framvegis við, at tann ætlanin skal gerast.

– Vit skulu gera ein áhugabólk fyri oynna við teimum politikarum, sum eru valdir fyri oynna, umframt umboðum fyri øðrum áhugabólkum, og í tí bólkinum skulu vit leggja eina framtíðarætlan fyri, hvussu Suðuroyggin skal mennast og byggjast út tey næstu 20-30 árini.

Hann sigur, at eitt er samferðsla, men tað eru eisini onnur viðurskifti, eitt nú verður tað alneyðugt at útvega fleiri arbeiðspláss í oynni til fólk við útbúgvingum, eitt nú at seta almenn størv á stovn í Suðuroynni, heldur enn í Havnini.

Í hesum sambandi hugsar hann ikki so nógv um størv, sum longu eru, men um nýggj størv.

Hann heldur, at teir politikarar, sum eru valdir fyri Suðuroynna, Jóannes Eidesgaard, Hergeir Nielsen, Henrik Old og hann sjálvur, skuldi havt góðar fortreytir fyri at arbeitt saman um eina slíka ætlan.

### Er ikki í vanda

Annars er tað onkur ið hevur stúrt fyri, at kemur ein nýggj samgonga til, fer hon at raðfesta útbyggingarnar kring um í landinum øðrvísi enn hendan samgongan hevur gjørt og at tað kann seta útbyggingar, sum ætlanin er at fara undir í Suðuroy tey næstu árini, í vanda, eitt nú bergholið ímillum Øravík og Hov, miðnámsskúlan í Vági, djúphavnina í Vági og samferðsluhavnina í Vági.

Men tí stúrir Johan Dahl ikki fyri.

Sjálvur metir hann, at tunnilin ímillum Øravík og Hov hevur størstan týdning og hann sigur at kemur sambandsflokkurin til valið, verður tunnilin gjørdur í næsta valskeiði, tí hann er neyðugur fyri at fáa samferðsluna í oynni at hanga saman.

Han vísir eisini á, at samferðsluhavnin á Tvøroyri er heilt einfalt neyðug at gera, men hann dugir heldur ikki at síggja, at ein samgonga við sambandsflokkinum, fer at raðfesta Suðuroynna aftari enn tann, sum nú hevur sitið.

# Eg taki fegin eitt tørn afturat

**Karsten Hansen er fegin um undirtøkuna, hann sjálvur fekk á valinum, hóast hann ikki slapp inn**

LØGTINGSVALIÐ
*Áki Bertholdsen*



*Hóast vánaligar umstøður at føra valstríð, fekk eg tvær ferðir so nógvar atkvøður sum á seinasta vali, so eg kann ikki annað enn vera væl nøgdur, sigur Karsten Hansen.*

–Eg haldi avgjørt, at samgongan eigur at halda fram, tí verður kósin, sum er stungin út í kortið, slept, hevði tað verið stórt spell.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum var ein av trimum landsstýrismonnum, sum ikki vórðu valdir inn á ting á løgtingsvalinum mánadagin.

Saman við teimum báðum sjálvstýrismonnunum, Eyðuni Elttør og Sámal Peturi í Grund, varð hann ov stuttur at røkka Løgtinginum hesuferð.

Sjálvur fekk hann 283 atkvøður og tað eru tvær ferðir so nógvar sum á seinasta vali í 1998. Í Klaksvík var hann toppskorðari hjá tjóðveldisflokkinum við 241 atkvøðum, 18 atkvøður fleiri enn Heini O. Heinesen, sum fekk 223 atkvøður í Klaksvík og sum annars varð valdur við 329 atkvøðum tilsamans.

Karsten Hansen er heldur ikki at tjóðveldisflokkurin fekk so gott val, sum hann hevði ætlað.

Men hann er sera væl nøgdur við sítt egna atkvøðutal

– Sjálvur eri eg sera væl nøgdur við valið, tí eg havi tvífaldað atkvøðutalið frá seinasta vali. Ikki minst er hann nøgdur, tí hann hevur ikki havt tær bestu umstøðurnar at føra valstríð.

– Eg havi verið upptikin av sáttmálasamráðingum ein stóran part av tíðini ímeðan hini valevnini hava ført valstríð. Men tað gjørdi eg, tí eg raðfesti samráðingarnar hægri enn valstríðið, og tað iðri eg meg ikki um í dag, hóast eg ikki var valdur.

Karsten Hansen heldur avgjørt ikki, at verkfallið hevur gjørt honum fortreð í valstríðnum. At eg tvífaldaði atkvøðutalið bendir ikki á, at verkfallið hevur verið ein meinbogi.

### Eigur at halda fram

Karsten Hansen heldur avgjørt, at samgongan eigur at halda fram.

– Tað veldst fyri ein stóran part um, hvat løgmaður ger, men eg haldi avgjørt, at samgongan hevur møguleika at halda fram.

– Tað kundi so verið saman við Miðflokkinum, sum hevur samtykt á aðalfundi, at hann tekur undir við fullveldinum. So saman við Miðflokkinum er meiriluti fyri sjálvstýristilgongdini. So er spurningurin um tað fæst semja við Miðflokkin um onnur mál, eitt nú blokkniðurskurðin og onur mál við.

Men so er tað eisini ein møguleiki at fáa javnaðarflokkin upp í samgonguna.

Og hann leggur afturat, at skuldi boð verið eftir honum at vera við at manna landsstýrið eitt skeið afturat, er hann til dystin fús.



# Arbeiðið aftur á flakavirkinum í Hvalba í summar



*– Tá ið flakavirkið í Hvalba letur upp aftur einaferð í summar, verður tað undir navninum Suðurís*

**– Arbeiðið, sum skal gerast fyri at fáa virkið at lúka krøvini, eru rættiliga umfatandi, men eigararnir vóna, at tað verður liðugt fyri summarfrítíðina**

ARBEIÐI
*Áki Bertholdsen*

**Hvalba:** Tað verður ikki fyrrenn einaferð í summar, at arbeiðið verður aftur á flakavirkinum í Hvalba.

Í løtuni verður arbeitt uppá at gera ábøtur á virkið og at broyta tað, so at tað lýkur øll krøv frá myndugleikunum til at tað kann farast undir virksemið.

Men Johan Páll Joensen í Klaksvík, sum er ein av høvuðsmonnunum aftan fyri nýggja virkið, sigur, at hetta arbeiðið er so mikið umfatandi, at tað helst fer at taka einar tveir mánaðir afturat, áðrenn virkið verður liðugt og endaliga góðkent.

–Tað gongur sína gongd og høvdu vit kunna byrjað at virka fisk fyri summarfrítíðina, hevði tað ikki verið so galið, men tað er ikki vist, sigur hann.

### Verður sum áður

Johan Páll Joensen sigur, at tá ið virkið letur uppaftur, verður tað helst við grundarlagið í tí fiskivinnu, sum er í Hvalba frammanundan.

Tvs, at virkið fer enn sum áður, at taka ímóti fiskinum frá djúpvatnstrolarunum.

Hann sigur, at bátarnir fiska eini 5.000 tons um árið og hevði nýggja virkið í Hvalba kunna fingið bróðurpartin av tí, hevði tað ikki verið so galið.

Nú er virkið í Hvalba frammanundan farið á heysin tvær ferðir, men tit høvdu neyvan farið undir tað aftur, høvdu tit ikki vónir um, at tað fór at bera til?

– Nei, tað høvdu vit ikki. Vit hava vónir um at tað skal bera til, ikki minst tí at virkið í Hvalba verður ein partur av einum samtaki, sum frammanundan telur eitt virki í Klaksvík, eitt á Eiði og eitt í Sørvági og so nú, eitt virki í Hvalba afturat.

– At tað eru fleiri virki í samtakinum, gevur tað okkum nógvar fyrimunir, sum gera raksturin bíligari.

–Eitt nú kunnu vit keypa fisk og vørur og tilfar í felag, vit kunnu hava felags sølu o.s.fr. Hann sigur, at nú fleiri virki eru, er tað eisini lættari at keypa heilar lastir og so at føra fiskin ímillum virkini at virka, so at hvørt virkið verður spesialiserað til virka ávís fiskasløg.

### Klaksvíkingar og hvalbingar

Tað er eitt sølufelag í Klaksvík hjá Johan páll Joensen, sum eigur helvtina av virkinum í Hvalba. Hina helvtina eiga hvalbingar, við teimum báðum trolarunum Steintór og Niels Paula, Arbeiðsmannafelagnum og Arbeiðskvinnufelagnum, á odda.

Í sambandi við flakavirkið í Hvalba er eitt felag stovnað, sum eigur bygningarnar og eitt annað felag, sum skal standa fyri sjálvum rakstrinum.

Hvalbingar og Klaksvíkingar eiga hvør sína helvt av hvørjum felag.

– Hetta er eitt virksemi, sum er bygt uppá álit ímillum partaeigararnar, sigur Johan Páll Joensen.

Hann sigur, at virkið kostaði tríggjar milliónir at keypa, men partapeningurin í feløgunum, sum eiga og skulu reka tað, er seks milliónir.

– Sostatt verður lítil og ongin skuld í tí, tá ið vit byrjað og tað er ein fyrimunur.

Tá ið flakavirkið í Hvalba einaferð letur upp, verður tað undir navninum Suðurís.

– Tað er útfrá tí, at í hesum samtakinum, hava vit longu frammanundan Norðís á Eiði, Eysturís í Klaksvík og Vestís í Vágum, sigur Johan Páll Joensen.


